Lag til rættis: Snorri Brend




*Nýggja tøknin hevur gjørt tað bæði lætt, bíligt og ómakaleyst at fáa jólakort síni gjørd umvegis netið*

# SENDA HELDUR JÓLAKORT Á NETINUM

**HETTA** ER TÍÐIN, TÁ **FÓLK** SENDA **JÓLAKORT** TIL FAMILJU, **VINIR** OG **KENNINGAR**. FYRR **VARÐ** HETTA GJØRT VIÐ **FRÍMERKI** Á, MEN NÚ HEVUR **NÝGGJA** TØKNIN TIKIÐ **YVIR**. BARA Í ÁR VERÐA **70 PROSENT** AV NORSKU **POSTKORTUNUM** SEND UMVEGIS **ALNETIÐ**.

Tey seinastu árini eru norðmenn í størri og størri mun farnir frá pappírsjólakortum sum verða keypt í handlum, – til heldur at bíleggja síni jólakort á netinum.

Rákið er vaksandi, og er so líðandi vorðin ein lønandi vinna hjá norskum aktørum.

Sambært bransjufelagsskapinum Fotorådet fara norðmenn í ár at bíleggja 70 prosent av sínum jólakortum á henda hátt.

Hetta staðfestir eisini leiðarin í netfoto-handlinum www.nfoto.no. Øystein Reed Bratten sigur, at rákið er púrasta greitt:

– Í ár vísa nýggjastu tølini, at parturin hjá kvinnunum av okkara jólakortkundum er hægri enn nakrantíð áður, við einum parti uppá 90 prosent.

– Í 2002 vóru tað bert menn sum keyptu jólakort umvegis netið, meðan kvinnurnar hava tikið fullkomuliga yvir í dag, sigur Bratten.

*»Eftirspurningurin eftir persónligum jólakortum er tvífaldaður seinastu tvey árini – frá 1,2 mió í 2008 til 2,2 milliónir kort í fjør«*

Tað vísir seg eisini, at ein øktur áhugi er fyri at sniðgeva síni egnu kort.

### Ómakaleyst

Tøknin gevur í dag møguleikar at gera royndir, og seta ein persónligan dám á jólakortini.

At tað er vorðið so nógv lættari at fáa fatur á, gera og bíleggja hesi jólakortini, hevur eisini gjørt sítt til økta vøksturin í ár.

– Fyrimunurin er, at ein rættiliga ómakaleyst og skjótt kann gera kortini persónlig, sigur marknaðarleiðarin hjá FotoKnudsen í Noregi, Cecilie Gaustad.

Støðan er vorðin greiðari og greiðari seinastu trý árini: Norsku jólakortini verða keypt á netinum.

– Eftirspurningurin eftir persónligum jólakortum er tvífaldaður seinastu tvey árini - frá 1,2 mió í 2008 til 2,2 milliónir kort í fjør, vísir Cecilie Gaustad á.

Tað sjáldsama er eisini, at kvinnurnar eru tær sum keypa flest kort á henda hátt. 85 prosent av kvinnunum sum keypa jólakort hjá FotoKnudsen eru í aldrinum 25-45 ár.

Bæði her og hjá Nfoto.no vænta tey metsølu í ár, kanska so nógv sum 35 prosent.

Tøl frá norska postverkinum vísa, at hvørt húski sendir upp til 10 kort, meðan hvør vaksin norðmaður sendir 4-5 kort.

# Hetta er mín jólasangur

Steinvør Fonn: *I heard the bells on Christmas day*

**– Av teimum mongu góðu jólasangunum havi eg valt "I Heard the Bells on Christmas Day" við Bryan Duncan, sigur Steinvør Fonn úr Klaksvík.**



*- Ein dag skal rættvísi og friður sigra á øllum órættvísi og ófriði. Áh, sum tað fer at vera gott!, sigur Steinvør Fonn úr Klaksvík*

Hvørt ørindi í hesum sanginum endar við: "Friður á jørðini - í menniskjum góður tokki".

Í Lukas 2, 14 stendur: "Dýrd veri Gudi á hæddini, friður á jørðini, í menniskjum góður tokki!" Hvussu mangan hoyra vit ikki hasi orðini um jólini? Men hvat siga tey okkum? Hvør er hesin friðurin? Hvør kann skapa og geva frið?

Jú, beint áðrenn ein stórur himmalskur herskari lovaði Gudi við hesum orðunum, stendur: "Óttist ikki! Eg kunngeri tykkum stóra gleði, ið skal vera fyri alt fólkið; Tykkum er í dag Frelsari føddur, sum er Kristus, Harrin, í staði Dávids."

Vit skulu tí ikki óttast men frøast, tí ein frelsari er føddur. Gud gjørdist menniskja, fyri at gera okkum ein útveg aftur til Sín, og tá ið vit fáa frið við Hann, verður Hann friður okkara. Hesin frelsarin er Jesus, sum ynskir at geva øllum Sín frið.

Hvør ynskir ikki frið? Vænti tey flestu okkara elska ljóman av orðinum "friður". At njóta frið heima eftir ein strævnan dag. At njóta frið saman við familju og vinum. At liva í friði og semju við onnur - uttan stríð og klandur. Jólini og hesin sangurin minna meg á hetta vakra orðið, og at Frelsarin ynskir at geva øllum Sín frið, sum er ein djúp sæla, tá ið Hann er í hásæti.

Heimurin í dag skríggjar eftir friði. Hann osar av órættvísi, hatri og ófriði. Og tað er júst henda stóra gjógvin millum frið og ófrið, sum kemur fram fyri meg, tá ið eg hoyri hendan sangin.

Tí jólini sum heild, Jesus, Hansara friður og hesin jólasangurin minna meg á, hvussu gott eg havi tað; hvussu signað og rík eg eri at hava ein himmalskan pápa, sum elskar meg treytaleyst; og harafturat at hava so góð foreldur og at vera uppvaksin í Føroyum, har vit hava tað so gott.

Í ljósinum av tí komi eg at hugsa um øll tey, sum ikki hava tað so gott, bæði her í Føroyum og úti í víðu verð, har ósemja, klandur, ófriður, órættvísi, neyð og kríggj valdar.

- Men sum seinasta ørindið sigur, so skal tað góða sigra á tí ónda at enda. Ein dag skal rættvísi og friður sigra á øllum órættvísi og ófriði. Áh, sum tað fer at vera gott!, sigur Steinvør Fonn.

*I heard the bells on Christmas day*
*I heard the bells on Christmas day*
*Their old familiar carols play,*
*And wild and sweet the words repeat*
*Of peace on earth, good will to men.*

*And thought how, as the day had come,*
*The belfries of all Christendom*
*Had rolled along the unbroken song*
*Of peace on earth, good will to men.*

*Till ringing, singing on its way*
*The world revolved from night to day,*
*A voice, a chime, a chant sublime*
*Of peace on earth, good will to men.*

*And in despair I bowed my head*
*"There is no peace on earth," I said,*
*"For hate is strong and mocks the song*
*Of peace on earth, good will to men."*

*Then pealed the bells more loud and deep:*
*"God is not dead, nor doth He sleep;*
*The wrong shall fail, the right prevail*
*With peace on earth, good will to men."*

Song writers: Oliver Dale, Bernie Herms, John Mark Hall